


*- Tað er ikki frítt fyri, at eg skammist yvir, at eg um nakrar dagar skal seta veljarakross mín við onkran av hesum politikarum, sum ikki við einum einasta orði undir valstríðnum hava nevnt Føroya Symfoniorkestur, skrivar William Smith millum annað í hesum hugleiðingunum um nýggjárskonsertina hjá Symfoniorkestrinum. Myndir: Jens Kristian Vang*





Konsertmeistarin, 1. violinisturin Sámal Petersen, gevur upp kamartónan. Í sama bili er kvirt í salinum, og vit uppliva henda serstaka, hátíðarliga dámin, ið leggur seg yvir teir nógvu áhoyraranar, tá ið strúkararnir og síðanni blásaranir og slagverkararnir stemma instrumentini.

Tann, ið stjórnaði hesum stóra ljómliði, var dirigenturin Bernharður Wilkinson. Bernharður er royndur orkesturleiðari bæði á europeiska meginlandinum og í Onglandi. Í Íslandi er hann vorðin ein myta sum tann serstakliga dugnaligi, nágreiniligi og eldhugaði orkesturleiðarin, hann er. Millum tónleikararnar í Føroya Symfoniorkestri er hann eins væl vorðin ein myta. Tosaði við tubaleikaran Atla Petersen, ið er líka so góðsliga stórur og imposantur, sum tað ljóðføri hann spælir uppá. Fyri trimum árum síðani var symfoniorkestrið meira at kalla ein bólkur av – um ikki glataðum spælimonnum og kvinnum – so kortini ein bólkur av forfjónaðum individualistum. Lítil og eingin menning tóktist vera. Tað hjálpur lítið, at eitt orkestur hevur framúrskarandi tónleikarar, um tað ikki ljómar sum ein eind. Hetta kynstrið hevur Bernharður megnað, og sunnukvøldið hoyrdu vit úrslitið av miðvísa arbeiði hansara. Eg havi ikki teir førleikarnar, ið skulu til fyri at ummæla eina konsert. Sum so mong onnur, hoyri eg tónleik út frá teimum avmarkingunum, tað ber í sær bara at duga at hoyra, tá ið tónleikurin klingar væl í oyrunum. Tær fínu nuansurnar, samspælið millum strúkarar, blásarar, slagverk, kór og solistar mugu tey, ið hava skil fyri slíkum, dissikera, men eg fekk varhugan av dynamikkinum og frískleikanum í spælinum, og eg frøddist um tað, eg hoyrdi. Sama dynamikkin og frískleikan fingu teir báðir Bjarni og Kári úr kórinum. Tá ið tey smáu hárini standa loddrætt, má vera samklangur millum ljómliðið og tann, ið hoyrir.

Tveir solistar vóru við. Svensk-franska sopransangarinnan Isabel Pigianol og føroyski guitaristurin Ragnar Olsen. Isabel var ein koketta, og hon dugdi væl at flirta við áhoyrarunum – ikki bara mannfolkunum, men við áhoyrarunum sum heild. Og hon sang væl. Sjálvandi gleddu vit okkum til Habanera úr Carmen. Ólavur ávarðaði okkum javnt og samt um dárakynstrini hjá hesari sponsku Femme fatale. Og eg hugsið, vit vóru forførd(ir). Bæði sangliga og leiklistarliga so væl, at vit kravdu eykanummar. Tá ið hon við mjúkari rødd hevði sungið O Mio Babbino Caro, máttu vit sleppa henni. Ja, ja, onkur fekk at kenna svikafulla lyndi Carmens meira enn aðrir – og her eru tað bara mannfólkini eg sipi til. Spell, at ein ikki sat nærri at miðgongini.

Við nógvum spenningi hevði eg sæð fram til at hoyra Ragnar Olsen spæla adagiona úr Concierto de Aranjuez fyri guitar og orkestur. Sum so ofta situr tú sum á nálum, heilt frammi á stólinum, tá ið solisturin fer at spæla. Tú roynir at transformera øll góð ynskir fyri leikaran. Hetta er eitt torført stykki. Men so eftir eitt bil, slappar tú av. Hesum hevur tann dámligi og sinniligi tónleikarin tamarhald á, hóast tað at hann mátti kompenserað fyri akustiska frábrygdið, sum so stór áhoyrarafjøld elvir til í einari konserthøll sum tann í Norðurlandahúsinum. Tú setti teg afturá og frøddist um talentið. Var Ragnar Olsen ikki landskendur fyri sunnukvøldið, so ivist eg ikki í, at føroyingar tóku hann til sín hetta kvøldið.

## Symfoniorkestrið, ið ikki vil glatast

Sum vera man hugsi eg, at Føroya Symfoniorkestur hevur alla samsýning frá okkara politikarum. Teir vóru har og lurtaðu, fleiri av teimum. Teir máttu vera stoltir av orkestrinum eins og vit onnur. Og sum tað sá út fyri mær, sótu teir eisina har við reinari samvitsku hvør og ein, gávumildir á at líta. Sjálvandi mátti tað vera ein fragd hjá teimum at hoyra, hvussu væl pengarnir vóru farnir, hugsaði eg, og frøddist saman við politikarunum um, at vit hava eitt so framúrskarandi orkestur í okkara gjøgnumgataða landi. Okkara lítla land klekir tónleikarar á alheimsstandardi. Talentini mest sum raplað av hesum knappanálshøvdinum á heimsatlasinum. Men eg skilji, at Føroya Symfoniorkestur er eitt lið av eldsálum. Av entusiastiskum, professionellum tónleikarum, sum, hóast teir lítið og einki fáa fyri tað, geva okkum tað gleði at spæla fyri okkum i einum orkestri, ið ikki vil glatast sum spælimenninir hjá Williami Heinesen, men sum verja um orkestrið við ektaðari spæligleði og einum óbendiligum dirvi. Tað er ikki frítt fyri, at eg skammist yvir, at eg um nakrar dagar skal seta veljarakross mín við onkran av hesum politikarum, sum ikki við einum einasta orði undir valstríðnum hava nevnt Føroya Symfoniorkestur. Eg havi ikki hoyrt teir nevnað tað í heila tikið. Tað er ikki bara hol undir Skopunarfjørð – tað er hol í høvdið.